# Selja ikki út áðrenn avtalu

**- Vit hava gjørt eina einfalda skipan. Nú skal onkur til at gjalda eitt sindur av pengum, tí man ikki hevur gjørt tað man skal sambart lógina sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður, sum vísir aftur kritikki frá oljufeløgum**

KOLVETNI OG SKATTALÓG

*Jan Müller*

Málið um umsitingina av kolvetnisskatti, ið varð til umrøðu á oljuráðstevnuni í Havn nú um dagarnar varð eisini umrøtt á tingi mikudagin, tá fyrispurningur varð settur Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharra um eitt nú dupultskattaavtalur. Landsstýrismaðurin segði, at tað er álagt toll- og skattstovuni at fyrireika tilfar at brúka í samráðingum við onnur lond um tvískattaavtalur. Vinnan er spurd, hvat hon heldur og ein útlendskur serfrøðingur er biðin um at ráðgeva um slíkar samráðingar. Sambart útvarpinum boðaði løgmansskrivstovan fyri stuttum frá enska sendiharranum, sum var í Føroyum í summar, at Bretland heldur seg ikki hava brúk fyri tvískattaavtalu við Føroyar.

Tað var annars Ben Arabo, formaður í FOÍB, sum á oljuráðstevnuni nú um dagarnar, ið hevðist at myndugleikunum fyri handfaringini av kolvetnisskattinum, har útlendsk oljufólk, sum koma til Føroya í nakrar dagar, skulu gjalda skatt frá fyrsta degi. Tað krevur eitt nú nógva umsiting hjá oljufeløgunum. Ein orsøk til, at hetta er so, er tann, at Føroyar hava ikki tvískattaavtalu við m.a. Ongland.

Við útvarpið mikukvøldið, segði Karsten Hansen, landsstýrismaður, at landsstýrið fer ikki at gera lagaligari skipanir fyri fólk úr londum, sum Føroyar ikki hava tvískattaavtalur við, fáa føroyingar ikki somu sømdir í hesum londum.

Karsten Hansen vísti á, at áðrenn kolvetnislóggávan varð gjørd tosaðu teir við lond, sum hava royndir á hesum øki og alla staðni varð fingu tey í Fíggjarmálaráðið ávarað um at ansa eftir, at tað vóru nógv smærri feløg, sum komu til landið og gjørdu eina uppgávu fyri nakrar milliónir í nakrar vikur, fingu sínar pengar frá loyvishavarunum og rýmdu síðani. Eftir stóðu skattamyndugleikarnir, sum ongar pengar fingu, tí hesi feløg hoyrdu til aðrastaðni í heiminum, sum man ongar avtalur hevur við. Tí varð føroyska lógin smíðað soleiðis, at loyvishavarin hevur ábyrgdina mótvegis undirentreprenørum, soleiðis at landskassin fær tann partin, sum hann eigur sambart lógini.

- Tá oljufeløgini her heima nú skulu gera eitt ávíst arbeiði hevur tað so víst seg, at onkur er misnøgdur, tí ábyrgdin er løgd á tey sigur landsstýrismaðurin við útvarpið og leggur aftrat, at hann heldur hetta vera eina góða skipan, tí yvirornað snýr tað seg hjá føroyingum um at fáa úrtøku burtur úr oljuvinnu so ella so. Og skal tú tað, hevur tú ikki nógvar møguleikar uttan at leggja ábyrgdina út. Vit hava gjørt eina einfalda skipan. Nú skal onkur til at gjalda eitt sindur av pengum, tí man ikki hevur gjørt tað man skal sambart lógina.

Karsten Hansen sigur víðari við útvarpið, at vit hava dupultskattaavtalur við nøkur lond og royna at fáa slíkar við enn fleiri lond. - Vit hava roynt at fáa eina avtalu við Bretland. Teir siga, at teir í løtuni hava ikki áhuga. So er hetta tað, sum vit kunnu handla við. Um vit fara og avreiða okkara poeng áðrenn, og so fara til samráðingar, tá vit hava givið út, og so fáa vit einki úrslit. Vilja teir hava eina avtalu við okkum, so vilja vit tað, men eg vil ikki selja út áðrenn segði Karsten Hansen við útvarpið mikudagin.

Ben Arabo, formaður í FOÍB:

# Sjálvandi skulu vit gjalda skatt

**– men Fíggjarmálaráðið má geva greið boð sigur Ben Arabo, formaður í FOÍB, sum heldur, at meðan kolvetnisskattalóggávan er greið, so er kolvetnisskattaumsitingarlóggávan er ógreið og inkonsekvent**

OLJUSKATTUR

*Jan Müller*



*Tað, sum serliga fellur FOÍB fyri brósti er burokratiska kravið um, at eitt vitjandi oljufólk, sum kemur á arbeiðsfund í Føroyum í bara ein dag, skal søkja um fyribils P tal, skal stovna konto og rinda A-skatt fyri henda eina dagin. Hetta er ein áseting, sum ikki er galdandi fyri nakra aðra vinnu enn bert oljuvinnuna vísir formaðurin í FOÍB, Ben Arabo á. Her eru útlendsk oljufólk á oljuráðstevnu í Norðurlandahúsinum*

*Mynd Jan Müller*

Nú Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum við útvarpið mikudagin vísti aftur atfinningunum frá formanninum í FOÍB á oljuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum, sigur Ben Arabo, at FOIB ætlar sær ikki út í nakað blaðkjak. - Eg veit ikki, um landsstýrismaðurin hevði lisið røðuna, ið eg helt sum formaður í FOÍB, tá hann úttalaði seg til útvarpið. Hann svaraði so ikki nógv til hana. Tá hann tosar um summi feløg, so vil eg gera vart við, at FOÍB umboðar øll oljufeløg, ið eru aktiv á Føroya økinum.

Ben Arabo sigur, at hetta snýr seg ikki um, at oljuvinnan ikki vil gjalda skatt.

- Sjálvandi skulu vit gjalda skatt, sum øll onnur, og tað er eingin, sum ivast í rímiligheitini í tí. Okkara viðmerkingar í hesum málinum snúgva seg um, at føroyska lóggávan er soleiðis skrivað, at ein persónur, ið arbeiðir innan oljuvinnu og býr í Bretlandi skal skrásetast hjá Toll- og Skatt, søkja um fyribils p-tal, stovna konto fyri at kunna móttaka løn gjøgnum A-skattaskipanina, arbeiðsgevarin hjá honum skal søkja um V-tal, lata sjálvuppgávu inn, lata útdrag úr ársroknskapi inn og stovna føroyska konto og gjalda løn gjøgnum føroysku A-skattaskipanina fyri hendan eina dagin. Kemur hinvegin ein persónur úr Bretlandi, sum ikki arbeiðir innan oljvinnu – t.d. selur skrivstovuinnbúgv ella annað fyri ein bretskan arbeiðsgevara, so kann hann verða her uttan skatt í upp til 180 dagar. So her hongur ikki saman hjá Fíggjarmálaráðnum.

Formaðurin í FOÍB sigur seg annars ikki júst vita, hvørja ráðgeving Karsten Hansen brúkar, tí Bretland hevur longu nú ein regul, sum ger tað møguligt hjá øllum at vera har í upp til 91 dagar, um arbeiðið er »incidental« av og á. So hann heldur, at har er ringt at síggja, havt skal samráðast um. Ein dupultskattasáttmáli má vælsaktans merkja, at tað sama skal verða galdandi báðar vegir.

Ben Arabo sigur víðari, at ásetingarnar, sum tær standa nú, svara til, at um ein føroyskur fiskaútfytari ella annað virki sendir ein mann til Bruxelles at selja, tí tá skuldi hesin, um Belgia hevði eina lóg, sum føroyingar hava fyri oljuvinnu, søkt um belgiskt p-tal, v-tal, latið sjálvuppgávu og úrdrag úr ársroknskapi, stovnað konto o.s.fr. -Hevði man gjørt tað fyri ein dag spyr FOÍB formaður og svarar: - Neyvan, men hetta er tað, sum Karsten Hansen krevur av oljuvinnuni.

- Eg loyvi mær at ivast í, um skattainntøkan frá einum persóni í ein ella tveir dagar er hægri, enn tað, sum tað kostar at viðgera umsókn um p-tal, umsókn um v-tal, skráseting og viðgerð hjá Fíggjarmálaráðnum. Nakað annað er so, at um tað er so strangt, tá fer ekspertisan at hittast eitt nú í Keypmannahavn til stytri fundir o.s.fr., og tað kann ikki verða til frama fyri Føroyar.

Ben Arbao endurtekur, at hetta er ikki ein roynd at sleppa undan skatti. - Vit hava eina kolvetnisskattalóggávu, ið er greið og sjálvandi skal tann skattur gjaldast, sum lóggávan sigur. Trupulleikin er kolvetnisskattaumsitingarlóggávan. Onkur ógreiða er enntá til beinleiðis fyrimuns hjá útlendskum feløgum framum føroysk feløg. Eitt dømi um, hvussu inkonsekvent hendan lógin er, er, at útlendskar fyritøkur hava ein 7% skattafyrimun, framum føroyskar fyritøkur, um talan er um útlendska arbeiðsmegi. T.v.s, at tveir mans, ið gera tað sama arbeiði og búgva sama stað verða skattaðir ymiskt, alt eftir um man arbeiðir fyri eitt føroyskt felag ella eitt útlendskt felag. Í hesum førinum kann tað útlendska felagið bjóða ein bíligari prís, tí lóggávan er skrivað so, og er hetta til skaða fyri føroyska vinnu. So man sær, at tað eru nógv ting, ið eiga at verða greiðari.

Ben Arabo sigur, at hann annars beit merki í, at Karsten Hansen í útvarpssamrøðuni brúkar Noreg sum fyrimynd. - Har er so tann munurin, at Noreg hevur milliardir at tunnum av rakstrarverdugum goymslum, meðan Føroyar inntil víðari ongar hava - null. At koperia lóggávu ókrittiskt, uttan at hugsa um samanhang, gagnar ikki nøkrum, hvørki myndugleikum ella teimum, ið skulu liva undir slíkari lóggávu sigur formaðurin Ben Arabo í viðmerkingini.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Demmus Hentze 80 ár



Hósdagin 4. desember fylti Demmur Hentze, landsrættarsakførari og fyrrverandi landsstýrismaður, í Havn, 80 ár.

Demmus er føddur á Sandi 4. desember 1923, sonur Sunnevu, f. Clementsen, úr Húsavík, og Johan Petur Hentze á Sandi. Hann giftist við Helenu, f. Debes, úr Havn.

Demmus varð útbúgvin løgfrøðingur í 1952 og byrjaði sum advokatfulltrúi 1. mai 1953 hjá Kehler & Lützen og bleiv landsrættarsakførari í 1958. Í 1981 stovnar hann sítt egna advokatvirki. Hann var skrivari í Føroya Skipara- og Navigatørfelag frá 1955-75, formaður fyri Landsskattanevndina frá 1964-75.

Hann var løgtingsmaður frá 1966-74 og frá 1978-80, undantikið tíðarskeiðið tá hann var landsstýrismaður frá 1975-81. Hann varð valdur í løgtingið í Sandoyar valdømi umboðandi Fólkaflokkin.

Hann kom aftur í Landsskattanevndina í 1981 og sat har til síðst í 90-unum. Hann var nevndarlimur í SEV frá 1967-75, limur í Norðurlandaráðnum frá 1973-80, nevndarlimur í Norrøna felagnum frá 1985-95, har hann var formaður frá 1990-95. Hann hevur verið brasilianskur varakonsul síðan 1957.

1.mai 2003 kundi Demmus halda sín 50 ára starvsdag sum sakførari.

## Mærsk McKinney Møller pensioneraður

Á stýrisfundi tann 18. november boðaði tann nú 90 ára gamli skipsreiðarin Mærsk Mc-Kinney Møller frá, at hann tann 15. desember fer frá sum formaður í stýrinum í A.P.Møller – Mærsk A/S. Hann fer ikki einans frá sum formaður men verður ikki við í stýrinum meira. Nýggjur stýrisformaður verður Michael Pram Rasmussen.

Fyrisitingarstjórin Jess Søderberg hevur framvegis dagligu leiðsluna meðan Mærsk Mc-Kinney Møller verður sameigari.

Mærsk Mc- Kinney Møller er tó ikki farin úr øllum nevndarsessum, hann er framvegis formaður í "A.P. Møller og Hustru Chastine MC-Kinney Møllers Fond til almene Formaal" og í Odense Staalskibsværft A/S. Eisini verður hann nevndarlimur í Mærsk Olie og Gas A/S.

Mærsk Mc-Kinney Møller er føddur 13. juli 1913 í Keypmannahavn. Sum sonur til Arnold Peter Møller bleiv hann sameigari í fyritøkuni í 1940. Tá pápin doyði í 1965, tók hann leiðsluna í A.P. Møller Gruppen.



A.P. Møller Gruppen, sum hevur høvuðssæti á Esplanaden í Keypmannahavn, hevur yvir 60.000 fólk í starvi og skrivstovur í yvir 100 londum. Skipaflotin er upp á umleið 250 skip, har ein stórur partur av yvirmonnunum eru føroyingar. Teir eiga m.a. flogfelagið Maersk Air og handilsketurnar Bilka, Føtex og Netto. Konsernin er mett til at hava eitt virði upp á umleið 150 milliardir krónur. Grunnurin, " A.P. Møller og hustru Chastine Mc-Kinney Møllers Fond til almene Formaal", hevur latið gávur til Tórshavnar Sjómansheim, Føroya Sjómansskúla og onnur áhugamál í Føroyum.

## Barnagarður og frítíðarskúli reistur á Argjum

Mikudagin var ein bygningur reistur á Argjum, sum skal verða karmur um nýggjan barnagarð og frítíðarskúla.

Bygningurin verður bygdur yvir ein grund, sum hevur staðið í hálvum gekki í fleiri ár.

Tórshavnar Kommuna hevur keypt grundstykkið og grundina, sum verður karmur um ein barnagarð við plássi til 40 børn og til frítíðarskúla við plássi til onnur 40 børn. Frítíðarskúlin heldur í løtuni til í AB-húsinum.

Umleið 9 milliónir eru settar av til arbeiðið, sum væntandi verður liðugt komandi summar.



*Mikudagin varð hesin bygningurin reistur á Argjum, sum verður karmur um barnagarð og frítíðarskúla*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Minningarorð um
# Petur Z. Hentze



Mánadagin 24. november 2003 bórust sorgarboðini, at Petur Z. Hentze brádliga var deyður, bert 60 ára gamal.

Petur, sum var útbúgvin maskinsmiður og síðani maskinmeistari, byrjaði sum lærari á Tekniska Skúlanum Tórshavn 1. jan. 1979. Sostatt restaðu bert 37 dagar í, at hann hevði sín 25 ára starvsdag.

Í vár helt Petur 60 ára føðingardagin. Hetta var, meðan føroyska náttúran vísti seg frá síni vakrastu síðu, og føðingardagurin varð lutvíst hildin í túninum Oman Viðarlund 13, í milda sólskininum henda stilla vármorgun.

Veturin er komin, og Petur er farin frá okkum.

Við sínum vinarliga og skemtingarsama lyndi vann Petur hjørtuni í okkum øllum.

Petur var eldhugaður og dugnaligur í sínum arbeiði. Vit kunnu spyrja hundraðtals maskinlærlingar, S.I.T.næmingar, tekniskar assistentar og nú eisini framleiðslutøkningar, sum gjøgnum hesi nógvu árini hava havt Petur sum lærara.

Seinast í 1980`unum varð álagt lærarunum á Tekniska Skúlanum at skipa sítt egna fakfelag. Petur gjørdist formaður í fyrstu nevndini. Hetta hevði samstundis við sær, at hann varð valdur til álitismann hjá lærarunum.

Við sínum nærlagni og eldhuga arbeiddi Petur við lív og sál, og hetta fekk stóran týdning fyri, hvussu skúlin varð lagaður til nýggju krøvini, tá hann kom undir føroyskar myndugleikar.

Petur hevði eisini onnur álitisstørv á skúlanum. Í tryggleikaarbeiði var Petur ein eldsál og skipaði eisini ein bygnað fyri hesum arbeiði.

Á eftirútbúgvingarøkinum var Petur somuleiðis undangongumaður, og tað eru ikki so fá virki í Føroyum og tekniskir skúlar í Danmark, sum høvdu tætt samstarv við Petur á hesum øki.

Góðu Marita, Dania, Hans Pauli og Karolina! Saman við tykkum drýpa vit høvur í virðing fyri kæra pápa tykkara og biðja Hann, sum øllum valdar, troysta og styrkja tykkum og familjuna í hesi sváru sorg.

**Lærarar og starvsfólk
á Tekniska Skúlanum í Tórshavn**

## Dagurin

**5. desember. Sabina.** Nógvar halgikvinnur bera hetta navn, men eingin tykist at hava havt samband við henda dag. Hildið verður tí, at talan er um tann halga mannin Sankta Sabas, ið var kendur kleysturbyggjari í Palestina. Hann doyði í umleið ár 532.